

Somikið nær bygdum øki var skriðjulopið við Kvívík týsnáttina

Mynd: Jens Kr. Vang

# Skriðjulop í Kvívík

Nógva regnið hetta seinasta samdøgrið hevur eisini sett síni merki í føroysku náttúruna.

Í Kvívík kundi støðan væl verði hættislig, tá skriðjulop kom í týsnáttina. sum tað sæst á myndini, so er skriðjan lopin rættiliga nær bygdini, og klettarnir, sum eru komnir longst oman, eru ikki langt frá bygdum øki.

Lukkutíð stóðst tó eingin mansskaði av, men talan var um enn eina áminning um veldugu náttúrukreftirnar, sum vit føroyingar dagliga liva við og undir.

# Maria Guttesen konsert við føroyskari kórdamu



*Maria Guttesen*

Nú verður gylt høvið at hoyra skjótt fløguaktuellu Maria Guttesen á konsertum í hesum mánaðinum. Maria er á veg við nýggjari fløgu, og fer at hava framførðslur í Århus og Keypmannahavn. Her verður høvið at hoyra løg av komandi fløguútgávuni, men okkurt eldri lag verður eisini at hoyra.

Afturat sær hevur Maria fingið føroysku Petsy Tvørfoss sum kórdamu. Harumframt fara gestatónleikararnir Morten Ærø og Søren Bigum at taka sær av trummu og gittarspælinum á konsertini í Århus.

Konsertirnar við Mariu Guttesen vera á Fatter Eskil í Århus 26 apríl kl. 22 og í Føroyahúsinum í Keypmannahavn leygarkvøldið 28 apríl kl. 21.

Meira er at frætta á www.mariaguttesen.dk

# Shell 15 mió kr. í avlopi

**Ársroknskapurin hjá Føroya Shell var 1,9 mió kr. betri í mun til árið fyri**

ROKNSKAPUR
*Jákup Mørk*



P/F Føroya Shell rindaði landskassanum 61,9 milliónir krónur í tolli og avgjøldum í 2005, og partafelagsskatturin var 4,1 milliónir krónur – tilsamans 66 milliónir krónur. Í miðal starvast 91 fólk hjá Shell í Føroyum, og tey fingu tilsamans 31 milliónir krónur í lønum og eftirlønum í 2005. Av hesum fekk stjórnin beint oman fyri 1 mió kr.

Oljunýtslan hækkar framvegis um allan heim, og størsti vøksturin stavar m.a. frá búskaparligu framgongdini í India og Kina. Hækkandi nýtslan hevur havt við sær hægri prísir, sum vit í Føroyum heldur ikki sluppu undan. Lægsti prísur á brenniolju frá P/F Føroya Shell í 2005 var 4.163 krónur fyri 1000 litrar í januar, og hægsti prísur á brenniolju var í september, tá oljan kostaði 6.025 krónur fyri 1.000 litrar. Hægri prísurin gav eisini úrslit í øktum umsetningi. Hesin var í fjør 534 mió kr. mótvegis 477 mió kr. í 2004.

Kappingarráðið kannaði føroyska oljumarknaðin í 2005, og í frágreiðingini frá ráðnum vóru ongar atfinningar mótvegis oljufeløgunum.

PF LEIF MOHR

Stovnað 1935

## Skrivstovustarv

Søkt verður eftir einum fólki til skrivstovuarbeiði, at byrja skjótast gjørligt. Starvið fevnir um alt vanligt skrivstovuarbeiði, herundir bókhald, lønir, telefon og tolling.

Talan er um eitt starv við niðursettari tíð áleið 20-30 tímar um vikuna eftir nærri avtalu. Um tað gerst neyðugt, má umsøkjarin kunna arbeiða meira.

**Vit kunnu bjóða**

tær eitt fjølbroytt og áhugavert arbeiði innan skrivstovuyrkið. Vit hava á leið 60 fólk í starvi, og kemur tú at taka tær av alskyns uppgávum. Vit kunnu eisini bjóða eitt áhugavert arbeiðspláss í menning. Vit hava eitt gott arbeiðsumhvørvi, har tú fært møguleika fyri at seta títt persónliga merki á arbeiðið.

**Krøv til umsøkjara**

Tað er ein fyrimunir um tú hevur praktiskar royndir innan skrivstovuyrkið. Harumframt er tað ein fyrimunir um tú:

- Hevur skrivstovuútbúgving.
- Hevur kunnleika til Navision.
- Kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- Hevur góð samstarvsevni.
- Kanst orðna fleiri ting í senn.
- Ert arbeiðssamur, røkin og fyrikomandi.

Vit leggja dent á, at tú hevur áræði og vilja til at gera mun, til gleði fyri teg sjálvan, tínar starvsfelagar og fyritøkuna.

**Meira fæst at vita**

um starvið við at venda sær til Hjalmar Jacobsen (hj@lm.fo) á telefon 35 12 20.

**Umsókn**

saman við avritum av próvskjølum og upplýsingum um arbeiðsroyndir, útbúgving v.m. skulu vera Pf. Leif Mohr, postboks 3100, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 3. mei 2006.

p/f Leif Mohr Hoyviksvegur 53 Postboks 3100 FO-110 Tórshavn Tel 351220 Fax 351230 e-mail: lm@lm.fo www.lm.fo

TEAM85